# Kapprenning um nevndarsessir

**Sessurin hjá Christiani Andreasen er leysur, og eisini Karl Vidtfeldt og Rúni Heinesen mugu berjast fyri sínari søk, nú tríggir nýggir avbjóðarar eru stillaðir upp**

FSF-NEVNDARVAL
*Jákup Mørk*







Hóast tað ikki verður stríðsval um formanssessin á komandi FSF-aðalfundinum, so munnu tað vera fleiri, sum ganga við bæði lítlum og stórum firvaldum í búkinum undan nevndarvalinum.

Her standa teir tríggir, Rúni Heinesen, Karl Vidtfeldt og Christian Andreasen fyri afturvali, og tað stendur greitt, at ein av hesum sessum í øllum førum er tøkur.

Christian Andreasen boðaði nevnliga í farnu viku frá, at hann ikki tók við afturvali, tá tað var líkt til, at Dánjal Andreasen framvegis skuldi vera formaður, og tað støðuna stendur hann við. Heldur ikki tá vit spurdu hann, hvørt tað møguliga kundi koma upp á tal við einum tiltakssessi í nevndini, var skjótt fyrrverandi nevndarlimurin at vika.

– Eg havi tikið eina støðu, og hana haldi eg fast við. Tað er alt, sum eg havi at siga um hasi tingini, segði Christian Andreasen í telefonini.

Soleiðis stendur ein sessur tómur í løtuni, men tað eru ikki færri enn tríggir, sum kappast um at sleppa framat hesum. Og tað kann hava við sær, at tað gerst trupult hjá antin Karl ella Rúna at endurvinna sín sess.

Í Havn hava bæði HB og B36 sett hvør sítt uppskot um nýggjan nevndarlim fram. HB hevur skotið Bjarka Mohr upp til sessin, og tó at hann hevur sínar røtur í B71, so man hann nú so smátt kenna seg sum havnarmann. Seinastu árini sum aktivur í bestu mansdeildini leikti Bjarki við HB, og hann hevur eisini búð í Havnini í drúgt áramál.

Uppskotið hjá B36 er Per Hansen, sum í nógv ár hevur verið virkin í nevndararbeiðinum hjá B36. Her er hann tó ikki í løtuni, men tað skerst ikki burtur, at hann er ein maður, sum nevndin í B36 hevur stórt álit á.

Seinasta uppskotið kemur úr Eysturoynni, har Magnus á Stongum er í uppskoti til nevndarsess. Magnus hevur í nógv ár lagt stóra orku í fótbóltin hjá EB/Streymi, og at síggja til er hann ein rættiliga væl umtóktur maður millum flestu feløgini.

### Rossahandlar

Spurningurin er so, hvørt tað verða onkrir rossahandlar gjørdir undan valinum, soleiðis at summi feløg kunnu kenna seg meira vís enn onnur.

Undan seinasta aðalfundi stóð greitt, at Havnin misti sín mann, tá Børge B. Hansen misti sessin sum næstformaður, og tað ljóðaði tá, at høvuðsstaðurin longu tá fekk lyfti um, at feløgini har skuldu fáa nýggjan lim inn á komandi aðalfundinum. Stendur hetta lyftið við, so er einki at ivast í, at antin Bjarki ella Per fáa sessin, sum nú stendur leysur, og so er spurningurin bara, hvat av feløgunum dugir betri at reka.

Einki er tó at ivast í, at eisini EB/Streymur vil hava sín mann inn. Sum nevnt, so hevur Magnus á Stongum stóran tokka millum fleiri feløg. Hann ber orð fyri at vera ein siðiligur maður, sum tó samstundis ikki er bangin fyri at geva sína hugsan til kennar, og tað er ein eginleiki, sum verður høgt virðismettur av nógvum. Spurningurin er so, um tað hevur kostað nakað í so máta, at EB/Streymur seinasta fríggjadag segði seg taka sin stuðul til Frithleif Olsen aftur. Kanska var hetta bara eitt taktiskt trekk, soleiðis at felagsliðið skuldi hava nakað at «forhandlað« við, tá tosið fall á nevndarvalið, men um so er, so kann hugsast, at hetta hevur givið baksláttur, nú Frithleif verður valdur uttan atkvøðugreiðslu.

Hvussu er og ikki, so skal nevndin mannast. Um talan so eisini her verður um útskifting, ella um gomlu nevndarlimirnir megna at lofta sær, er nakað, sum aðalfundurin fer at vísa.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

í Býin

BIG BROTHER
FRÍGGJAKVØLDIÐ
13. februar 2004
DJ KRISTIN
HESAFERÐ: JOHNNI, RAZ & SISSAL Í BARRINI
LEYGARKVØLDIÐ
14. februar 2004
DJ TUMMAS
HESAFERÐ: JOHNNI, RAZ & SISSAL Í BARRINI
18 ÁRA ALDURSMARK
eclipse

ÓKEYPIS
ATGONGD FRÍGGJAKVØLDIÐ 13. FEBRUAR 2004
Á PLATFORM TIL KLOKKAN 01.00
SKRÁIN HETTAR VIKUSKFITIÐ:
PLATFORM: DJ EYÐFINN
PLATFORM

fk Mat-seðilin
Hósdagin 12.feb :
Skinkusnitsel & Bankikjøt
Fríggjadagin 13.feb :
Lambslivur & Rivjasteik
Leygardagin 14.feb :
Oksafilét
Mánadagin 16. febr:
Bollar í karry & Stokt flak
Týsdagin 17. febr:
Stokt flesk & Milliónbúff
Mikudagin 18. febr:
Kjøtfrikadellir & Høsnarungalør
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 22,00
Maxiburgari *ella* Búffsandwich 30,00
Matstovan í Hoyvík

Klaksvíkar Klubbi Tel 455681
Fríggjakvøldið
Kl. 17 Fimmari
Leygarkvøldið (opið frá kl. 22)
Kl. 24 Dansur - Við Sámal, Ronnie og Kolbein
Sunnudagin
Kl. 15 Sjavskapping

í Býin

Vikumenu
Forrættur
Føroysk krabbasalat, borðreidd á broysknum salati við persilluolju og heimabakaðum breyði
Høvuðsrættur
Sniglafarserað steak av oksahárryggi, við Noilly Prat sauce og dagsins garniture
Dessert
Merlot'sa desserttallerkur við sukurlátutertu-ísi og hindberjacoulis
RESTAURANT MERLOT
Borðbílegging 31 11 21

club KAGGIN
Hóskvøldið spæla
Uni Debess Blues Duo
Ókeypis atgongd • double up kl. 21.00-22.00
Fríggjakvøldið spæla
STRANGE FRUIT
Leygarkvøldið spæla
STRANGE FRUIT
www.kaggin.fo

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
Nú fáast eisini Talutíðarkort
Føroya Tele Kall
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO 311234

Hósdagin 12. februar
Live kvøld við Finnur, Ronni, Joan Petur & Eyðun
Fríggjadagin 13. februar
Live kvøld við Finnur, Ronni, Joan Petur & Eyðun
Leygardagin 14. februar
Live kvøld við Finnur, Ronni, Joan Petur & Eyðun
Sunnudagin 15. februar
Gestabarrvørar: Johnni, Raz og Sissal frá Big Brother
CAFÉ NATÚR

BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
*Koyrt verður leygarkvøld:*
Vágaleiðin *(tlf. 217753)*
• Úr Vágunum *bert eftir avtalu*
• Tórshavn - Vágar kl. 04.30
Vestmannaleiðin *(tlf. 217752)*
• Vestmanna - Tórshavn kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

í Býin

Hóskvøldið
SØREN SØGAARD BLUESAR
20.00-20.30 STÓR GLØS KR 10,-
21.00-21.30 STÓR GLØS KR 10,-
Fríggjakvøldið
SINGLES KVØLD
- KOMIÐ OG BLÍVIÐ FORELSKAÐI Í GLASKJALLARANUM
KARAOKE Á STÓRSKÝGGJA
DOUBLE UP 20.00-22.00
SEINNI SERA GÓÐ TILBOÐ
Leygarkvøldið
FINNUR JENSEN & JÓAN P Á STONGUNUM
DOUBLE UP 20.00-22.00
YERTSHÙSIÐ
TÍ MANN ER BARA UNGUR TVÆR FERÐIR

felagið TORSHØLL
í vikuskiftinum spæla
Sølva og Bergmenn
Týskvøldið 17. februar kl. 19.00 - Sjavskapping
Ókeypis atgongd í kjallaranum fríggjakvøld og leygarkvøld

Manhattan
PUB & CAFÉ
Livandi tónleikur
Hóskvøldið, fríggjakvøldið og leygarkvøldið við:
Leikmonnum
Manhattan
PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96